## DAGSINS MEINING

# Hurlivasi um yvirtøku

## - Setið eina embætismannanevnd!

Einaferð afturat máttu vit staðfesta, at føroyingar siga eina søgu og danir siga sína søgu. Eftir seinastu samráðingarnar í síðstu viku máttu føroyingar bara ásanna, at tað ikki er greitt, um tað er neyðugt at broytaheimastýrislógina, um føroyingar skulu yvirtaka løgregluna og nøkur rættarmál.

Somuleiðis máttu vit aftur staðfesta, at tá landsstýrismenn fyri Tjóðveldisflokkin samráðast um yvirtøkur stendur í botni, samstundis sum tað gongur sum eftir lunni, tá landsstýrismenn fyri Fólkaflokkin samráðast við danir um at yvirtøka málsøki. Tí spyrja óivað nógvir føroyingar, um Tjóðveldisflokkurin leitar eftir eini áhaldandi konfrontatión við danir, so flokkurin um ikki annað hevur hesa fíggindamyndina til komandi valstríð, tí flokkurin hevur fá avrik at vísa á frá hesum hallandi landsstýrisskeiðinum.

Tann dagin samráðingarnar vóru, skiltist á føroysku fráboðanini, atheimastýrislógin skuldi ikki broytast. Ístaðin skuldi ein serlóg gerast fyri, hvussu løgreglan skuldi yvirtakast. Men seinri hoyrdu føroyingar í útvarpssamrøðu, at danski løgmálaráðharrin segði, at tað er neyðugt at broyta heimastýrislógina.

Tí hevði verið áhugavert at fingið henda partin í heimastýrislógini tulkaðan, tí um føroyingar hava møguleikan at yvirtaka løgregluna eftir heimastýrislógini, so eiga vit rættin til yvirtøku, hóast danska stjórnin ikki er sinnað at ganga ynskjunum hjá føroyingum á møti.

At yvirtaka rættarmál og løgreglu er ikki so einfalt, langt í frá so einfalt sum at yvirtaka skipasýnið ella flogvøllin. Tí vildi eitt og hvørt landsstýrið, sum veruliga var sinnað at yvirtaka hetta málsøkið, gjørt sítt fyri at fáa málið so væl lýst og fyrireikað sum gjørligt. Hetta hevði latið seg gera við at seta eina embætisnend, sum danski løgmálaráðharrin hevur skotið upp.

Hesi nevnd vil landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum ikki vita av. Og sjálvandi kunnu fólk gita, at hann vil ikki hava málið lýst og yvirtøkuna væl og virðiliga fyrireikaða. Men hvat sigur tann hóvligari parturin í landsstýrinum við løgmanni á odda - setir hann hart ímóti hørðum og krevur, at ein embætisnevnd verður sett at fyrireika eina yvirtøku? Tað er gjørt í sambandi við skipasýnið, sum neyvan er so trupult mál sum løgregla og rættarmál! Okkara uppskot er: setið eina embætismannanevnd at fyrireika ætlanina at yvirtaka løgregluna og rættarmálini!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Springaradrápið í Havn

**Jógvan Páll Lassen**



Ein tíðindamaður í útvarpinum hevur nú í nærum eina viku í fleiri samanhangum umrøtt »tað ólógliga springaradrápið í Havnini« og sum skilst, verður tað sagt at vera ólógligt, tí sýslumaðurin ikki hevði givið loyvi til tess.

Undirritaði hevur gjørt útvarpsmannin varugan við, at umrøðan ikki er røtt, men hóast hetta, hevur hann ferð eftir ferð, og seinast í samrøðu við Jústines Olsen, djóralækna, endurtikið pástandin.

Jústines var eftir tykki tíðindafólksins serkønur, tí hann hevði verið við til at gjørt kunngerðina.

Nú er tað einaferð soleiðis, at einhvør myndugleiki, t.v.s. Vinnumálastýrið og/ella sýslumaður sum forvaltningsmyndugleiki, skal – áðrenn avgerð verður tikin – hava heimild til at taka avgerðina, hetta fylgir av vanligum forvaltningsrætti.

Við atliti til grind og springarar v.m., so er tað við kunngerð frá landsstýrinum ásett, at tað er loyvt at taka hesi hvalasløg.

- Grindahval
- Hvessing
- Kjafthvítar springarar
- Sjórutar springarar

og fyri veiðu av hesum sløgum, eru reglurnar um grind og reglurnar um góðkenning av hvalvágum galdandi.

Tær reglurnar eru ásettar í kunngerð nr. 46 frá 8. apríl 1998 frá Føroya Landsstýri, og verður har ásett í § 1

- »At Føroya Landsstýri er hægsti myndugleiki í øllum málum viðvíkjandi grind«.
- Stk. 2 »Landsstýrið kann við kunngerð seta bráðfeingisbann fyri grindadrápi í ávísum grindadømum«.

Eftir hesi reglu hevur sýslumaðurin onga heimild fyri at banna grindadrápi – men bert landsstýrið. Í § 1 í kunngerðini er ásett, at sýslumaðurin stílar fyri grindadrápi, og hevur eftirlit við at rakstur og dráp fara fram eftir reglunum, og skal hann saman við grindaformanninum ansa eftir, at hvør ger sína skyldu. Hetta hevur við sær, at sýslumaðurin hevur skyldu til at hava eftirlit við drápinum, og skal ein leggja merki til, at einki mark er sett fyri, hvussu stór grindin skal vera, men skal sýslumaðurin harafturímóti, sambært § 5 í kunngerðini, kunna møguligan finningarbát, um landsstýrið hevur sett forboð fyri at drepa. Meting sýslumansins í hesum sambandi er uttan týdning.

Hetta merkir, at sýslumaðurin sum sína embætisskyldu skal taka sær av grindaboðum, herundir springaraboðum.

Einasta heimild, sum sýslumaðurin hevur at steðga drápi, er nevnd í § 11 í kunngerðini, har tikið verður til:

- »Um grind, sum verður hildin til, er størri enn pláss er fyri á hvalvánni, kann sýslumaðurin steðga drápinum. Skipað verður so fyri, at tað, ið eftir er av grindini, verður rikið út aftur«.

Sostatt er niðurstøðan tann, at sýslumaðurin hevur skyldu til sum í so nógvum øðrum viðurskiftum í sínum arbeiði, at útinna eina embætisskyldu, sum í hesum føri er at taka sær av grindini ella springarunum. Um sýslumaðurin ikki unnast at útinna sínar embætisskyldur, eigur hann sum konsekvens at umhugsa, um tað er rætt starv hann hevur valt.

Tað er eisini ein undarlig rættarstøða, sum fólk í Havn og Eysturoynni eru komin í, tí hóast lógin og kunngerðin er galdandi fyri allar Føroyar, so sleppa nakrir føroyingar at drepa springarar, meðan nakrir ikki sleppa.

Meira undrunarvert tykist tað, at eitt starvsfólk hjá tí almenna Útvarpi Føroya á henda hátt, og í eina heila viku, kann blíva við at trútta niður í fólk um »tað ólógliga springaradrápið«, hóast hann er gjørdur varugur við, at málið ikki er so einfalt, sum hann hevur gjørt tað til.

Annars hevur verið ført fram, hvussu illir menn eru í sambandi við springaradráp, men tær ferðir, eg havi verið í hesum drápi og skift í Havn, havi eg ongan illan mann sæð. Tað havi eg harafturímóti sæð í sambandi við grindarakstur og -dráp, og ikki minst undir grindaskifti.

Loksins vil eg siga við Jústines Olsen – vælsignaður, fá tað skrivað í grindareglugerðina, sum skal standa – ístaðin fyri at úttala teg um, hvussu reglugerðin skal skiljast. Tað telur slettis ikki løgfrøðisliga, hvat tú heldur, tá ið tað ikki stendur skrivað.

Tá ið hetta er sagt, so er tað ein heilt annar spurningur, hvørvítt vit eiga at drepa springarar ella ikki, og kunnu øll fólk hava sína hugsan um hetta, men er hetta framvegis ikki ein spurningur, sum sýslumenninir skulu taka avgerð um, men bert Føroya Landsstýri, sum einsamalt hevur hesa heimild.

# Nevndin afturvald

**Føroya Tannlæknafelag hevur havt aðalfund, har nevndin varð aftuvald**

AÐALFUNDUR

Føroya Tannlæknafelag hevði ársaðalfund fríggjakvøldið 28 september. Á fundinum varð nevndin afturvald.

Nevndarval er á hvørjum ári, og hesaferð var einki mótvalevni til teir tríggjar envndarlimirnar, sigur Tannlæknafelagið í tíðindaskrivi.

Á triðja ári er Kaj Anthoniussen nú formaðuri í Føroya Tannlæknafelag saman við tveimum kvinnuligum nevndarlimum.

Unn Jacobsen er skrivari, meðan kassameistarin eitur Unnur Jensen.

Føroya Tannlæknafelag upplýsir í tíðindaskrivinum, at tað í dag eru 42 virkandi tannlæknar í Føroyum. Tað heldur felagið eftir øllum at døma vera nokk, tí viðmerkt verður, at øll øki í landinum tykjast vera væl fyri við tannlæknum.

**ej**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


# Bindur komandi landsstýri



*Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur, finst at, at landskassaskuld bara verður umfíggjað heldur enn goldin. Tað er fyri at vísa ein fittari roknskap, men leggur í veruleikanum bara nýggjar byrðar á komandi landsstýri, sigur hann*

**Lánsbrævaskuld hjá landskasanum skal umfíggjast heldur enn gjaldast, skjýtur landstýrismaðurin við fíggjarmálum upp í fíggjarlógaruppskotinum. Tað er bara at leggja skuld á komandi lansdsstýri, heldur fíggjarnevndarlimur**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár hevur stórt hall heldur enn lítið yvirskot, sigur Vilhelm Johannesen, sum umboðar Javnaðarflokkin i fíggjarnevndini. Tað er ikki rætt, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.

Tað er misvísiandi at siga, at fíggjarlógaruppskotið, sum varð lagt fram fríggjadagin, hevur eitt yvirskot upp á 18 milliónir krónur, sigur Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur. Tí í veruleikanum hevur tað eitt stórt undirskot.

Bara tann eini posturin, sum vit lesa um í viðmerkingunum, vísir, sigur hann, at ein landskassaskuld í lánsbrøvum upp á 300 milliónir krónur fellur til gjaldingar komandi ár. Skal hon gjaldast, verður beinanveg eitt hall upp á 282 milliónir krónur, um tær 18 milliónirnar verða brúktar at gjalda við.

Men landsstýrið ætlar ikki at gjalda hesa skuldina, sigur hann og vísir á, at í viðmerkingunum stendur eisini, at ætlanin er at umfíggja hetta lánsbrævalánið.

– Tað er einki annað enn at leggja fíggjarligar byrðar, sum ein ikki sjálvur megnar at gjalda, yvir á herðarnar á einum komandi landsstýri, sigur vilhelm Johannesen.

## Hatta er gamalt

Men Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, sigur, at hatta er ikki rætt, sum Vilhelm Johannesen førir fram.

Framgangshátturin, sum her verður nýttur, er gamal, vísir hann á. Soleiðis hevur verð gjørt í eini trý-fýra ár, at skuldin hevur verður flutt undan við endurfígging. Hann sigur, at tað hevur verið hildið skilagott, nú tosað verður um lánsbrævamarknað, at hava hasi lánsbrøvini standandi. Tey kosta okkum einki, sigur Karsten Hansen, tí vit fáa renturnar afturgoldnar.

Tað er eitt sterkt ynski bæði úr fíggjarheiminum og frá umsitingarligari- og politiskari síðu í Føroym at hava lánsbrøv. Tí verða tey ikki goldin men endurfíggjað, sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum.

Um avlopið í fíggjarlógaruppskotinum sigur hann annars, at tað er ikki 18 milliónir men 159 milliónir.

Av uppskotinum upp á 159 milliónir hevur landsstýrismaðurin valt at brúka 141 milliónir at gjalda statsskuld við. Hann kundi tað sama brúkt alt, sigur hann, men valdi at seta 18 milliónir í Landsbankan, har landskassin frammanundan eigur væl av peningi.

## Skiftisgrunnur

Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur, vísir á, at í víðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið stendur, at tá lóg um Búskapargrunn og Skiftisgrunn verða lagdar fyri Løgtingið, skal fíggjarlógin endurskoðast.

– Hvat so? spyr Vilhelm Johannesen. Skal so øll fíggjarlógin gerast av nýggjum? Og hvat skal í grunnarnar? Verður tá nakað yvirskot eftir ella hvussu? Kanska skulu vit selja burtur av landskassans ognum fyri at finna grunnfæ?

Tó, tekur hann aftur í aftur. Tað standa pengar frá yvirskoti, sum áður hevur verið á fíggjarlógini, í landsbankanum. Tað skal helst brúkast til at fíggja fullveldið við, sigur Vilhelm Johannesen.

Tað skal tað, svarar Karsten Hansen. Men hann kallar tað at fíggja samfelagið. Tað skal eingin revisión gerast av fíggjarlógini, tá lóg um Skiftisgrunn kemur fyri, tí teir pengarnir, sum fara í Skiftisgrunnin, eru tøkir.

Um at selja av landskassaognunum sum Føroya Banka, Atlantsflogi ella Føroya Tele, sigur hann, at tað hevur verið nevnt politiskt. Men er ongan veg komið. So tað verður ikki haðani, Skiftisgrunnurin verður fíggjaður, sum nú sær út.

Annars sigur Karsten Hansen seg ikki bera nakran ótta fyri, at møguligar eykajátanir, sum fara at koma, fara at gera enda á teimum 18 milliónunum, sum væntandi verða eftir komandi ár.

– Vit hava kalkulerað við einum búskaparvøkstri upp á eitt prosent, meðan hann reelt seinnu árini hevur verið fimm-seks prosent. So har man helst okkurt fara at verða eftir kortini, sigur hann.

Og annars vísir ahnn á, at tað er ein treyt, at allar eykajáttanir til einahvørja tíð skulu vera útreiðsluneutralar.

# Spreingir íløgukarmin

**Karsten Hansen spreingir tann íløgukarmin, hann sjálvur hevur ásett, sigur Vilhelm Johannesen**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, ger beint móti tí, hann sjálvur prædikar, sigur Vilhelm Johannesen, fígjarnevndarlimur Javnaðarfloksins.

Í fleiri ár hevur Karsten Hansen, landsstýrismaður tosað um ein langtíðar íløgukarm hjá landskassanum. Hesin íløgukarmur skuldi liggja um einar 160-170 milliónir krónur árliga, sigur Vilhelm Johannesen.

Samstundis hevur landsstýrismaðurin álagt kommunum teirra íløgukarm, sum tað ikki er lukkuligt at fara útum.

Men nú fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár er lagt fram, hevur Karsten Hansen so ruddiliga sprongt sín egna íløgukarm fyri landskassan, vísir Vilhelm Johannesen á.

Íløguætlanini hjá Karsteni Hansen fyri komandi ár eru nú knappliga vorðin til 232 milliónir, sum jú er langt oman fyri tað, hann fyrr hevur hildið seg til, sigur Vilhelm Johannesen.

Tað kann so bara merkja, at endamálið við eini langtíðarætlan er slept, sigur hann.

Hann vísir á, at á eykajáttanarlógini, sum varð viðgjørd herfyri, vórðu íløgur fyri hálvatjúgundu millión inndrignar, tí komið varð ikki til tær.

Tær verða nú bara fluttar til komandi ár. So mikið størri verður »yvirtrekkið« í mun til ta langtíðarætlan, sum Karsten Hansen hevur lagt, men sjálvur spreingir.

Serliga á samferðsluøkinum verða stórar iløg-ur komandi ár. Eitt nú til Suðuroyarskip og ferjulega á Syðradali.

– Men rímiligt. Valár er, tekur Vilhelm Johannesen aftur í aftur.



*Ein av teimum mongu íløgunum, Karsten Hansen skjýtur upp at gera komandi ár, er ferjulega á Syðradali*

*Mynd: Jens Kristian Vang*